## Tjaldur í hálvfinaluni

Fyri fyrstu ferð nakran tíð er hondbóltsfelagið Tjaldur komið í hálvfinaluna í steypakappingini í hondbólti. Tí syrgdu Tjaldurskvinnur fyri, tá tær í gjárkvøldið spældu fjórðingsfinalu móti Søljuni. Úrslitið av dystinum millum tey bæði oddaliðini í 1. deild gjørdist 24-20 til Tjaldur, sum soleiðis kann brynja seg til at spæla tvær hálvfinalur í næstum.



## VB vann í Vestmanna

VÍF beit frá sær, men tað var VB, sum vann plássið í hálvfinaluni, tá kvinnuliðini hjá feløgunum spældu í Vestmanna í gjárkvøldið. Endaliga úrslitið av dystinum var, at VB vann 30-25, eftir at tær í hálvleikinum vóru á oda 16-11. Sum ikki einaferð, so var Daiva Toumaite besti málskjúttin hjá VB. Hesa ferð átti hon 16 av málunu. Fyri VÍF skeyt Liljan Djurhuus 8 mál.

# Fýra kappróðrar í juni næsta ár

**Tað verður stutt millum kappróðrarnar í 2008, tá ið 10-mannaførini bara tvær ferðir fara at kappast á 2000 metrum**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður langt millum stevnurnar næsta summar, tá ið flaggskipini í kappróðrinum, 10-mannaførini, fara at kappast á 2000 metrum. Av teimum sjey kappróðrarstevnunum verður tað bara á sundalagsstevnuni í Hósvík og á eystanstevnuni í Runavík, at tað verður møguleiki at kappast á longsta teininum.

Í Klaksvík verður kappast á 1000 og 1500 metrum, og á jóansøku í Vági, fjarðastevnu í Vestmanna og vestanstevnu í Miðvági verður tað bara kappast á 1000 metrum. Á ólavsøku er málið 901,30 metrar.

### Hvørt vikuskifti í juni

Fyrr í heyst hevur ljóðað, og tað hevur eisini verið at sæð á onkrari heimasíðu, at fyrsti kappróðurin skuldi verða í Klaksvík longu 24. mai. Í yvirlitinum, sum Róðrarsamband Føroya nú hevur kunngjørt, sæst, at norðoyastevnuaftan verður hvørki leygardagin 24. mai ella leygardagin 31. mai. norðoyastevnuróðurin verður fyrsta leygardagin í juni, sum í 2008 verður 7. juni. Ofta plagar hvítusunnan at vera um mánaðarskiftið mai/juni. Í 2008 verður hvítusunnudagur longu sunnudagin 11. mai.

Harvið er tað greitt, at tað verður stutt millum kappróðrarnar næsta summar. Á yvirlitinum hjá Róðrarsambandinum sæst, at tað frá tí, at fyrsti róðurin hevur verið á norðoyastevnu leygardagin 7. juni og fram til síðsta róðurin, sum – soleiðis sum tað altíð hevur verið – verður á ólavsøku, er tað bara eitt frívikuskifti og so ein stór vika afturat.

Fyrsti róðurin verður á norðoyastevnu í Klaksvík leygardagin 7. juni. Vikuskiftið eftir, leygardagin 14. juni, verður kappast á sundalagsstevnu í Hósvík, næsta leygardagin, 21. juni, verður kappast á jóansøku í Vági, og fjórði kappróðurin í juni verður á eystanstevnu, sum verður í Runavík leygardagin 28. juni.

Í juli verða tríggjar kappróðrarstevnur: fjarðastevna í Vestmanna verður 5. juli, vestanstevna í Miðvági verður 12. juli, og so verður ein lítið steðgur, áðrenn tað verður rundað av á ólavsøkuaftan. Ólavsøkuaftan verður í 2008 ein mánadag – mánadagin 28. juli.




*Saman við eystanstevnuni í Runavík er Hósvík einasta róðrarøkið, har tað í ár verður kappast á 2.000 metrum*

## Fimm tey bestu funnin

**Í Bylgjuni hjá Útvarpi Føroya í gjár varð funnið fram til tey fimm nøvnini, sum dystast um at hava framt ársins ítróttarbragd**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í sendingini skuldu ítróttaskrivararnir hjá Sosialinum, Dimmalætting og Oyggjatíðindi hvør í sínum lagi gera eina meting um, hvat ítróttaravrik teir hildu vera tað besta í 2007. Tað vóru sjálvandi hópin av nøvnum, sum vóru uppi og vendu hjá teimum trimum, men í seinasta enda var rættiliga stór semja um, hvørji tey fimm ovastu nøvnini skuldu verða.

Tey fimm, sum nú skulu kappast um heiðurin, eru Pál Joensen (svimjing), Katrin Olsen (kappróður), Elspa Mørkøre (svimjing), Rógvi Jacobsen (fótbóltur) og U21-landsliðið í mansfótbólti.

Atkvøðugreiðsla fer nú fram millum hesi fimm, og verður hendan skipað á heimasíðuni hjá Útvarpinum, www.uf.fo. Tann 29. desember verður skipað fyri stórum gallakvøldi á Rex í Havn, úrslitið av atkvøðugreiðsluni verður almannakunngjørt. Umframt at finna ársins ítróttanøvn verða ársins tónleikanøvn eisini funnin her.

# Todi ætlar at byggja stórt

**Tá ið kommunan ikki er sinnað at vera við, ætlar Todi sjálvur at byggja nýtt stadion á Amager fyri 150 milliónir krónur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Todi Jónsson ætlar at byggja nýtt stadion á Amager. Sambært bold.dk stendur hetta at lesa í Berlingske Tidende. Ætlanin fevnir um stadion í Ørestaden, sum er tað økið á Amager, har tað seinastu árini hevur verið mest bygt, og har tað framvegis er nógv virksemi.

Ætlanin fevnir um stadion við plássi fyri 10 túsund áskoðarum. Kostnaðurin verður roknaður at fara at verða 150 milliónir krónur.

Síðani Todi Jónsson saman við øðrum føroyingum kom framat í Fremad Amager, hevur tað verið og verður tað arbeitt miðvíst fyri, at Amager aftur skal gerast partur av bestu donsku fótbóltsdeildini.

Fremad Amager, sum næsta summar verður til FC Amager, flutti niður í fjør, men nú liggja teir aftur væl á kósini. Liðið er klárt oddalið í 2. deild, og tað skal ganga ógvuliga illa, um teir ikki fara at flyta upp í hesum kappingarárinum.

Næsta takið verður so at flyta upp í SAS liguna. Ítróttarliga kann tað væl eydnast at flyta upp, men karmarnir eru ikki nóg góðir til SAS ligu fótbólt í Sundby Idrætspark. Tí er tað, at Todi og felagar hansara ætla sær at byggja nýtt stadion.

Keypmannahavnarkommuna er ikki sinnað at stuðla endurbygging av Sundby Idrætspark, og tí ætlar Todi at byggja nýtt:

– Vit ætla okkum at byggja á Amager. Vit ætla sjálvir at seta pengar í nýggja stadion, og vit hava aðrar, sum eru áhugaðir í at gera íløgu saman við okkum, sigur Todi Jónsson við Berlingske Tidende.

Todi hevur verið í sambandi við kommununa, og hann vónar, at tað fer at bera til at fáa grundøki lagaliga til keyps frá Keypmannahavnar kommuna, og at tað síðani fer at bera til at fara undir byggingina sum skjótast.